# Føroyskir tannáringar kannaðir í USA

**Seinastu fimtan árini eru gjørdar rættiliga kollveltandi kviksilvurkanningar av føroyskum børnum og ungdómum. Í hesum sambandi hava 12 tannáringar júst verið í USA, har man við sera framkomnari útgerð hevur kannað, hvussu kviksilvur ávirkar heilan**

KANNING
*Jan Müller*

Herfyri vóru 12 føroyskir unglingar, ið taka lut í eini granskingarætlan, sum Deildin fyri Arbeiðs-og Almannaheilsu m.a. ger saman við læknaskúlanum á Harvard, í USA til kanningar. Har hava tey framkomna útgerð til myndagerð av miðnervalagnum, soleiðis at tað ber til at síggja, hvussu heilin starvar, meðan fólk loysa uppgávur. Spurningur er so um tað ber til at ávísa við hesum tólum tað negativa árinið, sum kviksilvur og PCB hava á heilan. Um so er at henda forkanningin vísur nakað áhugavert er ætlanin at kanna nógv fleiri tannáringar, sum eru partur av kviksilvurkanningunum, sum byrjaðu í 1986 upplýsir Pál Weihe, leiðari á deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu.

Kanningarhátturin, sum brúktur verður, verður róptur FMRI "Functional Magnetic Resonance Imaging". Pál Weihe sigur , at hesin kanningarháttur er so dýrur, at vit ikki kunnu kanna øll børnini í kviksilvurkanningunum. Tey hava í fyrstu syftu bert fingið pening til 12 og hava valt 6 børn við lutfalsliga stórum útsetilsi fyri kviksilvur og PCB í móðurlívi og 6 við lutfalsliga lítlum at vera við í víðari kanningunum.

Endamálið við kanningini er at vita, um tað ber til at síggja mun á, hvussu heilin starvar hjá teimum, sum hava verið úti fyri nógvum kviksilvuri og PCB mótvegis teimum, sum hava verið úti fyri minni.

Ein MRI skannari brúkar eitt sterkt magnetfelt at gera myndir av heilanum við. Tað er sostatt ikki talan um røntgengeisling ella geislavirkna stráling annars. Eftir øllum tí man veit, er henda kanning ikki vandamikil.

Kanningarhátturin var hesin: Alt av metal, sum kann ávirkast av eini magnet verður tikið av kroppinum. Persónurin leggur seg á eina legu, sum síðani verður rullað inn í eitt op í skannaranum. Har verður fyrst tikið ein vanlig MR-skanningsmynd, og síðani verður farið yvir at gera funktións MRI. Tað merkir, at barnið verður biðið um at brúka heilan á ymsan hátt, soleiðis at virkni í heilanum verður fangað av skannaranum. Hetta virkni kann verða t.d. at trumma við einum fingri, at trýsta á ein knøtt, tá ein ávísur bókstavur vísir seg, at nevna navnið á einum tingi, sum vísir seg á einum skermi og at royna minnið í tølum, sum verða lisin upp. Hvør av hesum kanningum tekur 10-15 minuttir. Barnið skal liggja í frið undir sjálvari kanningini, men millum kanningarnar ber til at tosa og røra seg. Kanningin tekur uml. 90 minuttir. Fróði Debes, sálarfrøðingur gav sálarfrøðiligu uppgávurnar, meðan serfrøðingar á McLean, Brain Imaging Center, stóðu fyri skanningini.



*Teir tólv 16-áru gomlu ungdómarnar úr øllum landinum saman við ferðaleiðarunum. Dreingirnir eru Ottar í Hjøllum, Hans Arni Bjarnason Thomsen, Páll Hansen, Kristian Johannesen, Terji Nón, Nikkil Heinesen, Debes Danielsen, Jóan Petur Joensen, Jógvan Arnbjørn Vest, Leivur Reinert Djurhuus, Jón Klæmint Hofgaard, Høgni Dam. Ungi maðurin í strípútari troyggju í fremstu røð er Hans Kárason Mikkelsen av Eiði, sum byrjaði at lesa á Harvard Universitetinum í heyst. Standmyndin aftanfyri er av John Harvard, sum lat peningin til at seta á stovn hetta elsta universitetið í USA. Tað var í 1636*

*Mynd Pál Weihe*

Pál Weihe sigur, at nyttan, sum fæst burtur úr hesi kanning, er fyrst og fremst størri vitan um, hvussu og hvar kviksilvur ávirkar heilan. Tann einstaki fær sum so onga nyttu burtur úr kanningini annað enn at vita, at heilin sær normalur út.

Henda verkætlan er eitt samstarv millum Deildina fyri Arbeiðs-og almannaheilsu, Boston University og Harvard sjúkrahúsið McLean í Boston.

Fíggingin er fingin til vega frá Det Lægevidenskabelige Forskningsråd í Danmark.

Ferðin gekk við flogfari úr Føroyum yvir Reykjavík beinleiðis til Boston og sama veg heimaftur viku seinni. Ferða- og uppihaldsútreiðslur vóru goldnar, men annars verður eingin samsýning latin. Sjálvt um ferðin var stutt sóu dreingirnir nógv áhugavert, m.a. Museum of Science í Boston, Boston Aquarium og plássið har World Trade Center einaferð stóð á suðurendanum av Manhattan.

Løgtingsformaðurin dundrandi ósamdur við løgmann:

# Mugu raðfesta fíggjarlóg hægri enn fletting

**Løgmaður og landsstýrimenn hava skyldu til at vera í tinginum allar dagar, meðan fíggjarlógin er til viðgerðar. Hetta átti so ikki at forðað nøkrum at luttaka í seyðahaldinum sigur tingformaðurin, sum ongar ætlanir hevur um at flyta viðgerðina av fíggjarlógini næsta ár soleiðis sum løgmaður skjey upp herfyri**

FJALLTÍÐ OG FÍGGJARLÓG
*Jan Müller*

Edmund Joensen, tingformaður er ikki samdur við Anfinn Kallsberg, løgmann, tá hesin í samrøðu við Sosialin herfyri segði, at tað má vera hansara fulli rættur at fara á fjall og fletta, tá fíggjarlógin er til viðgerðar. Løgmaður vildi við tí vísa aftur nakað av tí kritikki, sum var undir viðgerðini av fíggjarlógini, har tað varð spurt eftir honum. Sjálvur var hann til viðgerðina tann fyrsta dagin og helt seg tá hava greitt nóg væl frá sínum. Hann metti tað eisini vera av týdningi at vera við til at halda lív í okkara gerandismentan og helt fyri, at tingformaðurin átti at flutt viðgerðina av fíggjarlógini, so hon ikki fall saman við fjalltíðini og flettingini. Tingformaðurin er dundrandi ósamdur við løgmann.

- Er hetta skemt ella álvara. Løgmaður hevur skyldu til bæði sjálvur at vera til alla viðgerðina av fíggjarlógini og at syrgja fyri, at allir landsstýrismenninir eisini eru har. Ein tingviðgerð av fíggjarlógini, sum regulerar alt samfelagið, og har allir tingmenn eru til steðar, tí hon eisini viðger teirra egna lokalsamfelag, átti at verið raðfest hægri enn nakað annað. Hon er jú ein fyritreyt fyri allari framtíð hjá føroyingum. At man ikki kann seta tríggjar dagar av í oktober til tað - havi eg ikki orð fyri. Her ruggar ikki rætt.

Tingformaðurin sigur víðari, at hetta skuldi ikki forðað nøkrum í at fara á fjall. Teir flestu føroyingar luttaka eitt sindur í landbrúki, í seyðahaldi, í rakstri, í flettingini ol. um heystið, men fólk arbeiða fyri tann skyld.

Edmund Joensen sigur, at tingið hevur bara verið saman í 17 dagar eftir ólavsøku. Í hesum mánaðinum hava verið fáir fundir. Tá man so hevur bjóðað seg fram at vera tingmaður veit man, hvat man hevur bjóðað seg til. Velur man so at bjóða seg fram til at vera landsstýrismaður ella løgmaður, tá er í hansara verð als einki at tosa um. Tá ber als ikki til at vera burturstaddur, tá fíggjarlógin verður viðgjørd. Hann vísir eisini á, at løgmaður er tann einasti, sum er valdur av tinginum. Hann hevur tí eina heilt serstaka ábyrgd.

Tá nevnt verður, at man kann flyta viðgerðina spyr tingformaðurin, hvønn hann skal flyta hana fyri? - Tað eru 32 tingmenn og 9 landsstýrismenn. Hvørjum skal eg flyta hana fyri? Hvør er meira mentaður? Teir ganga ikki á fjalli á Viðareiði, í Miðvági, á Oyrabakka, á Sandi og í Suðri í senn. Henda viðgerð tekur tríggjar dagar. Eg veit ikki hvar eg skuldi flutt viðgerðina. Vikuna eftir er heystfrítíðin. Løgmaður hevur so eisini verið ein av teimum, sum hevur lagt fíggjarlógina fyri tingið, tá síðsta freist er komin. Hon skal í allar nevndirnar. Eg dugi ikki at síggja, at løgtingsformaðurin fær gjørt nakað. Tað er ein bundin uppgáva.

### Hvussu verður næsta ár?

- Hvør enn verður løgtingsformaður tá ella løgmaður fyri tað, trúgvi eg ikki hann fær flutt viðgerðina. Tingformaðurin hevur skyldu til at fáa hana til viðgerðar skjótast tilber.



